# VÍF nærkast finaluplássi




Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Heimaliðið var als ikki til reiðar í seinna hálvleiki, tá vestmenningar vunnu triðja sigurin upp í slag

Uni Holm Johannesen

Vestmenningar hava brett upp ermar. Liðið hevur vunnið tríggjar dystir upp í slag, og vestmenningar hava fingið samband við finalupláss aftur.

Tað var í seinna umfarinum í Ítróttarhøllini á Skála í gjár, at VÍF setti kós móti sigrinum. StÍF, sum hevði runnið undir liðini á gestunum í fyrra hálvleiki, var ikki reiðar, og skjótt fóru vestmenningarnir undan.

### Eli vardi væl

Eli Muller var væl upplagdur í gjár. Hann vardi fyri fleiri upplagdum møguleikum í fyrra hálvleiki, men var ikki settur undir eins stórt trýst eftir steðgin.

Trupulleikin hjá StÍF var serliga, at heimaliðið tók ikki av upplagdu møguleikunum. Tað eydnaðist stundum at spæla seg ígjøgnum, men strandingarnir vóru ikki nóg neyvir.

VÍF vann uppiborið og fer nú at fyrireika seg til dystin móti Neistanum næsta vikuskiftið.

uni@sosialurin.fo

**Atlantic Airways Deildin** *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 13 | 463 | 356 | 107 | 25 |
| 2 | KÍF | 13 | 365 | 335 | 30 | 17 |
| 3 | VÍF | 13 | 359 | 324 | 35 | 14 |
| 4 | Kyndil | 13 | 334 | 328 | 6 | 14 |
| 5 | H71 | 12 | 311 | 314 | -3 | 12 |
| 6 | StÍF | 13 | 322 | 338 | -16 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 11 | 238 | 397 | -159 | 0 |




Mynd: Álvur Haraldsen

# Neistin er bara best

**HONDBÓLTUR** Neistin staðfesti sína støðu sum einaráðandi í bestu mansdeildini. Greipuvinnararnir vunnu við trimum málum á nærmasta kappingarneytanum

Uni Holm Johannesen

Tað er eingin, sum stendur Neistanum kurl. Liðið hevur bara mist eitt stig í hesum kappingarárinum.

Leygardagin royndu kollfirðingar, sum eru nummar tvey, aftur at steðga oddaliðnum, men tað eydnaðist ikki.

Tað krevur nógv at vinna aftur og aftur. Tað er torført at vera í leiklutinum sum favorittur hvørjaferð, meðan mótstøðuliðini spæla við fullari megi, tí oddaliðið skal koppast. Men tað vísir seg ikki at vera nakar trupulleiki hjá Neistanum, hóast Ingi Olsen, venjari, viðgekk fyri Kringvarpinum í gjár, at tað er torført at seta sínar leikarar upp.

– Vit eru átta stig framman fyri nummar tvey. Tað er torført at vera eins spentur til landskappingardystir sum til avgerandi dystir, har nakað veruliga stendur upp á spæl. Vit hava meira ella minni tryggja okkum finaluplássið, og tað er ringt at vera motiveraður, sigur Ingi Olsen.

Neistin vann 31-28 á KÍF.

### Liðini eru væl fyri

Neistin hevur besta liðið í landinum. Heini Hanusarsson, Finnur Hansson, Jugoslav Djumic, Áki Mørk, David Edvardsen, umframt fleiri aðrar, borga fyri góðsku. Men fyrimunurin, sum Neistin og KÍF hava framum hini liðini, er kropsliga venjingin.

Bæði liðini eru ómetaliga væl fyri og kunnu spæla við fullari megi í ein samfullan tíma. Tað eru hini liðini ikki eins væl før fyri.

### KÍF gav mótstøðu

Tað var Neistin, sum streyk avstað í fyrstu atløgu leygardagin, hóast KÍF ongantíð lat heimaliðið sleppa undan. Neistin var á odda við trimum málum í steðginum.

Kollfirðingar settu vertirnar undir trýst í seinna hálvleiki, men Neistin helt høvdið kalt og varðveitti sína leiðslu.

Finnur Hansson, sum skeyt seks av málunum hjá Neistanum, varð útvístur í seinasta minuttinum. Hann verður tí ikki tøkur, tá fyrra hálvfinalan móti VÍF skal avgreiðast týskvøldið.

Jugoslav Djumic, Neistin, var toppskjútti við sjey málum.

# Vestmenningurin átti høvuðsleiklutin

**HONDBÓLTUR** Karl Jóhan Djurhuus spældi ein branddyst, tá Kyndil vann seg aftur í finalustríðið í gjár. Vestmenningurin skeyt átta mál

Uni Holm Johannesen

Undan kappingarbyrjan í ár skifti hann brádliga tilveruna í bestu deildini út við hugnahondbólt í triðbestu deildini. Vestmenningurin var hollur stuðul hjá HC Kvívík, sum varð stovnað í vetur.

Karl Jóhan Djurhuus varð knýttur at hópinum hjá Kyndli um jólini. Í gjár spældi hann í grønu troyggjuni fyri fyrstu ferð. Og vestmenningurin spældi ein branddyst.

Hann skeyt átta mál, tá Kyndil fekk samband við annað av finaluplássunum aftur.

### Rótutur dystur

Grannauppgerðin í ítróttarhøllini í Hoyvík var rótut.

Liðini framdu nógv mistøk. Tá ferð ikki kom á spælið valdu leikararnir at stríðast. Tað hevði fleiri útvísingar við sær.

Kyndil var minst vánaliga liðið á vøllinum. Aftaná keðiligu byrjanina komu havnarmenninir fyri seg, og beinanvegin í seinna hálvleiki komu teir framum við trimum málum. Hoyvíkingar svaraðu ongantíð aftur.

Erlendur Johannesen stóð eisini sera væl í málinum hjá Kyndli.

### Trý stig

Kyndil hevur verið lítið støðugt í sínum avrikum í hesum kappingarárinum. Úrslitið er, at liðið hevur runnið aftaná teimum ovastu.

Við sigrinum í gjár hevur liðið aftur fingið samband við annað av finaluplássunum. KÍF, sum er nummar tvey, tapti fyri Neistanum, og Kyndil vann seg sostatt tvey stig nærri kollfirðingum. Trý stig skilja liðini í løtuni.

uni@sosialurin.fo